FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 9. juni 2022
J. nr.: 22/10255
Viðgjørt: AE

Svar til fyrispurning nr. 52-197/2021 frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Una Rasmussen, um Herjólf sum avloysaraskip

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Metir landdsstýrismaðurin, at Herjólfur verður nøktandi sum avloysaraskip, meðan Smyril er í dokk?
2. Í mun til ferðafólkatøl og farmaflutning, sum er í løtuni, hvussu nógv metir landsstýrismaðurin, at samferðslan til Suðuroynna verðus skerd, um Herjólfur skal sigla, meðan Smyril er í dokk?
3. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er nøktandi at skerja samferðsluviðurskiftini til Suðuroynna, meðan Smyril er í dokk?
4. Hvørjar ábøtur skulu gerast, og hvørji krøv eru annars fyri, at Herjólfur kann sigla við ferðafólki, og hvat kosta hesi?
5. Nær og hvussu leingi skal Smyril í dokk?

Svar til fyrispurning nr. 1, 2 og 3
Strandfaraskip Landsins hevur í fleiri ár ynskt at fáa eitt avloysaraskip fyri Smyril, bæði tá ið hann fer í dokk, og eisini tá Smyril skal umvælast. Talið av ferðafólki, og mongdin av farmi og akførum er vaksið nógv á Suðuroyarleiðini seinastu árini.

Í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina fyri 2022 varð biðið um eina játtan til eitt frakt/avloysaraskip á Suðuroyarleiðini. Tað var øllum kunnugt, at talan var um ferjuna Herjólf III, og Løgtingið hevur verið kunnað um ætlanina so hvørt.

Strandfaraskip Landsins førdi fram nakrar grundgevingar fyri at fáa fáa eitt avloysaraskipi, og tað eru serliga hesi fýra viðurskifti, sum vísa, hvussu viðbrekin Suðuroyarleiðin er:

- Dagligur rakstur - ferðafólk eru ónøgd, tí ferðaætlanin ikki kann haldast. Hetta vegna avbjóðandi havnaumstøður og nógvan farm.
- Lítil tíð er til skipað viðlíkahald og harvið longri dokkingartíð.
- Dokking - tilvildarlig skip verða vald, sum kosta óneyðuga nógv.
- Óhapp - onki avloysaraskip er tøkt til Smyril, um okkurt størri óhapp skuldi verið.

Fyri at tryggja eina varandi og trygga loysn og loysa avbjóðingarnar á Suðuroyarleiðini mælti Strandferðslan til at skilja sundur vinnuligan farmaflutning og ferðafólkaflutning. Hetta kann gerast við at keypa eitt brúkt farma- og ferðafólkaskip, sum eisini kann virka sum ferðafólkaskip, tá ið tørvur er á tí.

Strandferðslan hevur havt samráðingar við "Vegagerðin" í Íslandi, um at keypa Herjólf III. Eftir ynski frá eigaranum var ætlanin tó broytt soleiðis, at tað í staðin skuldi verða ein leigusáttmáli í hálvt annað ár, og síðan skuldi Strandferðslan keypa skipið.

Leigusáttmáli um Herjólf III er júst gjørdur við Vegagerðina, har Strandferðslan leigar skipið í 16 mánaðir. Vegagerðin vil nú ikki selja skipið, tí teir hava sjálvir brúk fyri einum avloysaraskipi.

Smyril hevur væl størri kapasitet enn Herjólfur, og tað fer at merkjast á leiðini. Smyril kann hava 975 ferðafólk við umborð í tíðarskeiðinum apríl – oktobur, og 800 ferðafólk hinar mánaðirnar, og tekur 200 bilar, ella 30 stór akfør (sleip/treylarar).

Herjólfur er ikki skrásettur undir føroyskum flaggi enn, og endaliga manningarskjalið og ferðafólkaloyvið er ikki givið av myndugleikanum, men Strandferðslan hevur fingið vegleiðandi skjøl. Tað "hægsta" ferðafólkaloyvið er 530 fólk treytað av, at alduhæddin ikki er meira enn 2,5 metrar. Í øðrum føri 450 ferðafólk. Tað eru 350 sitipláss, 100 koyggjur og 45 briksir til ferðafólk.

Eftir føstu ferðaætlanini siglir Smyril 36 ferðir um Suðuroyarfjørð um vikuna ella 1.872 túrar um Suðuroyarfjørð um árið. Tað kemur at kalla ikki fyri, at ikki øll ferðafólk sleppa við. Verður hugt eftir ferðafólkahagtølunum, so vóru tað bert 53 túrar í 2021, har tað vóru eru meira enn 400 ferðafólk við, ella 3% av øllum túrum, og bert 25 túrar, har tað vóru meira enn 500 ferðafólk.

Sostatt kann roknast við, at siglingin við ferðafólki verður á góðari leið, meðan Herjólfur røkir Suðuroyarsiglingina.

Hinvegin so tekur Herjólfur bert 67 bilar, og verða umstøðurnar til bilflutning og farmaflutning nógv skerdar. Fyri at bøta um støðuna er ætlanin, at Herjólfur skal sigla ein farmatúr um náttina.

Strandferðslan upplýsir, at fundur verður bæði við vinnuna í Suðuroy, og við borgarstjórarnar í Suðuroy.

Svar til fyrispurning nr. 4
Herjólfur skal til 30 ára klassing. Ein rampa skal gerast á hekkuni soleiðis, at bilar og farmur kunnu koyrast umborð og í land. Bjargingarbátarnir eru gamlir og skulu skiftast út.

Tað verður mett til at kosta Strandferðsluni eini 7,0 mió. kr. at gera Herjólf kláran til sigling og fyri at leiga skipið frá 1. juni 2022 til 31. desembur 2022.

Svar til fyrispurning nr. 5
Smyril fer í dokk 16. august 2022 og fer aftur í sigling fyrstu vikuna í oktobur.

Tinganes, 9. juni 2022.

Uni Rasmussen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum